UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Danir spara

Hóast danir hava fingið meiri løn seinastu árini, og hóast fleiri og fleiri hava fingið arbeiði, er privata nýtslan hjá fólki ikki vaksin síðani 1998. Tað sæst í einari kanning, sum Danske Bank hevur gjørt.

Kanningin sigur, at danir skylda meiri í bankum og realkredittfeløgum nú enn fyrr, men samstundis hava fólk sett munandi meiri pengar til uppsparing, samstundis sum virðið á sethúsunum er hækkað.

Úrslitið er sambært Danske Bank, at tey næstan 2,5 milliónir húskini í Danmark eiga í meðal 1,2 milliónir krónur í dag - í pengum, virðisbrøvum og fastari ogn.

## Fiskimenn vigast

Nógvir fiskimenn í Noregi eru í øðini um eina nýggja reglugerð, sum krevur eina serliga heilsuváttan frá fiskimonnunum.

Reglugerðin, sum sjóferðslumyndugleikarnir hava gjørt og sett í gildi, sigur m. a., at menn mugu ikki viga meiri enn eitt ávíst samanhildið við, hvussu stórir teir eru. Sum dømi kann verða nevnt, at ein maður, sum er 180 sentimetrar til hæddar, skal ikki viga meiri enn í mesta lagi 112 kilo. Kortini ber til at fáa frávik frá regluni, men bert í avmarkaða tíð. Í síðsta mánað fekk ein útróðrarmaður í Sunnmøre at vita, at hann máttti tveita tólv kilo av sær innan mánaðir. Gjørdi hann ikki tað, máttti hann binda bátin.

Nógvir norskir útróðrarmenn eru í øðini um nýggju regluna. Teir halda, at Noreg er við at gerast eitt land, har alt skal ásetast við reglum, og teir eru longu farnir at spyrja, hvat tað næsta verður.

# Evropa vil ikki hava meiri kríggj



*Eitt palestinskt húski oman á tí, sum er eftir av húsum teirra, eftir at gravkýr hjá ísraelska herinum javnaðu tey við jørðina. Tað er hesum politikki, Evropa er ímóti*

*Mynd: Reuters*

**Tað dragnar millum USA og tess sameindu í Evropa, nú amerikanarar umhugsa næsta stigið í bardaganum ímóti yvirgangi**

ALTJÓÐA YVIRGANGUR

*Árni Joensen*

Eygleiðarar siga, at franski uttanríkisráðharrin, Hubert Vedrine, segði ikki annað enn tað, sum Evropa hugsar, tá hann í einari opinskáraðari samrøðu við franska útvarpið France Inter mikudagin fanst at politikkinum hjá stjórnini í Washington.

- Vit stuðla USA, amerikanska fólkið er vinfólk okkara, og soleiðis verður tað eisini. Men í dag eru vit hótt av einari amerikanskari uppfatan, sum ber í sær, at alt snýr seg um bardagan ímóti yvirgangi. Men vit góðtaka ikki hendan hugburðin. Vit eiga at loysa teir grundleggjandi trupulleikarnar so sum fátækradømi og órættvísi, segði Hubert Vedrine við France Inter.

Politiskir eygleiðarar siga, at orðini hjá franska uttanríkisráðharranum eru enn ein tekin um ta vaksandi ósemjuna millum USA og tess sameindu í Evropa. Aftan á atsóknirnar tann 11. september í fjør góvu evropeisku londini USA fullan stuðul, men síðani er kuril komin á tráðin.

Meðan Bush forseti tosar um lond sum Norðurkorea, Irak og Iran sum "ónd lond" og hóttir við at víðka bardagan ímóti yvirgangi, halda tey sameindu hjá USA í Evropa ikki, at tað er neyðugt við fleiri hernaðartiltøkum.

Treytaleysi amerikanski stuðulin til ísraelsku stjórnina bøtir heldur ikki um viðurskiftini millum USA og Evropa. Í útvarpssamrøðuni segði Hubert Vedrine beinleiðis, at Evropa er ímóti amerikanska stuðlinum til ísraelsku stjórnina.

- Eftir okkara tykki er tað skeivt at stuðla einum politikki, sum ikki hevur annað endamál enn kúgan. Politikkurin hjá Sharon er skeivur. Hetta hava vit sagt, og vit hava lagt fleiri uppskot fram, segði franski uttanríkisráðharrin.

# Kvinnurnar í Kabul farnar aftur í skúla

**Fyri fyrstu ferð í mong ár hava ungar kvinnur tikið prógv á lærda háskúlanum í Kabul**

AFGHANISTAN

*Árni Joensen*

Undir Taliban-stýrinum fingu afghansku kvinnurnar ikki loyvi at útbúgva seg, og tær, sum brutu bannið, vórðu harðliga revsaðar.

Men nógvar kvinnur sýttu kortini fyri at laga seg eftir teimum reglunum. Summar valdu at útbúgva seg við hús, annaðhvørt einsamallar ella saman við øðrum, og nógvar fingu so mikið burturúr, at tær stóðu upptøkuroyndina á lærda háskúlanum.

- Í fleiri ár slapp eg ikki í skúla. Eg noyddist sjálv at útbúgva meg, segði ein av kvinnunum, sum fyri nøkrum døgum síðani stóð upptøkuroyndina á lærda háskúlanum í Kabul.

Áhugin at sleppa á lærda háskúlan var so stórur, at vápnaðir løgreglumenn máttu halda skil á teimum nógvu monnunum og kvinnunum, sum vildu sleppa inn um dyrnar.

Rektarin á lærda háskúlanum í Kabul, Gholan Manten Daniz, hevur ikki sæð kvinnur í skúlastovuni í fleiri ár, og hann segði seg eisini fegnast um, at hin helvtin av samfelagnum var komin aftur í skúla.

Úr Norðurlondum:

## Nýta ikki MMR

Næstan 20 prosent av foreldrunum í Norðurnoregi taka ikki av tilboðnum um at koppseta tey smáu við MMR-vaksinuni.

Heilsumyndugleikarnir í Tromsø siga, at 17 prosent av foreldrunum siga beinleiðs nei, tá læknarnir koma við tilboðnum, og hini trý prosentini aftra seg við at taka av og biðja um umhugsunartíð.

Orsøkin til ivan hjá foreldrunum eru kanningar í Bretlandi, sum benda á, at samband kann vera millum MMR-koppseting og autismu.

## Krevja broyting

Nógvir svenskir politikarar tosa nú um at banna innflytaraforeldrum at noyða døturnar at góðtaka hjúnasamband, longu tá tær eru blaðungar. Orðaskiftið hevur tikið seg upp, eftir at ein kurdiskur maður myrdi sína egnu dóttur, tí hon sýtti fyri at giftast einum kurdiskum manni, sum foreldrini høvdu valt henni.

Mikudagin samtykti Ríkisdagurin at áleggja stjórnini at leggja fram uppskot til lóg, sum skal forða sonevndum "tvningilshjúnaløgum" og hjúnaløgum, har annað ella bæði framvegis eru børn. Og sambært samtyktini skal lógin umfata øll fólk í Svøríki, sama um tey eru svenskir ríkisborgarar ella ikki.

Svensk lóg ásetir, at fólk skulu hava fylt 18 ár fyri at fáa loyvi at gifta seg. Lógin hevur tó eina grein, sum gevur frávik frá hesum aldursmarkinum, men tann reglan umfatar einans svenskar ríkisborgarar. Tað er hent, at fólk av útlendskum uppruna hava fingið loyvi at gifta seg, hóast tey bert hava verið 15 ár. Tá hevur verið víst til lógina í upprunaliga heimlandinum, men hetta verður nú steðgað.



UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Danir spara

Hóast danir hava fingið meiri løn seinastu árini, og hóast fleiri og fleiri hava fingið arbeiði, er privata nýtslan hjá fólki ikki vaksin síðani 1998. Tað sæst í einari kanning, sum Danske Bank hevur gjørt.

Kanningin sigur, at danir skylda meiri í bankum og realkredittfeløgum nú enn fyrr, men samstundis hava fólk sett munandi meiri pengar til uppsparing, samstundis sum virðið á sethúsunum er hækkað.

Úrslitið er sambært Danske Bank, at tey næstan 2,5 milliónir húskini í Danmark eiga í meðal 1,2 milliónir krónur í dag - í pengum, virðisbrøvum og fastari ogn.

## Fiskimenn vigast

Nógvir fiskimenn í Noregi eru í øðini um eina nýggja reglugerð, sum krevur eina serliga heilsuváttan frá fiskimonnunum.

Reglugerðin, sum sjóferðslumyndugleikarnir hava gjørt og sett í gildi, sigur m. a., at menn mugu ikki viga meiri enn eitt ávíst samanhildið við, hvussu stórir teir eru. Sum dømi kann verða nevnt, at ein maður, sum er 180 sentimetrar til hæddar, skal ikki viga meiri enn í mesta lagi 112 kilo. Kortini ber til at fáa frávik frá regluni, men bert í avmarkaða tíð. Í síðsta mánað fekk ein útróðrarmaður í Sunnmøre at vita, at hann máttti tveita tólv kilo av sær innan mánaðir. Gjørdi hann ikki tað, máttti hann binda bátin.

Nógvir norskir útróðrarmenn eru í øðini um nýggju regluna. Teir halda, at Noreg er við at gerast eitt land, har alt skal ásetast við reglum, og teir eru longu farnir at spyrja, hvat tað næsta verður.

# Evropa vil ikki hava meiri kríggj



*Eitt palestinskt húski oman á tí, sum er eftir av húsum teirra, eftir at gravkýr hjá ísraelska herinum javnaðu tey við jørðina. Tað er hesum politikki, Evropa er ímóti*

*Mynd: Reuters*

**Tað dragnar millum USA og tess sameindu í Evropa, nú amerikanarar umhugsa næsta stigið í bardaganum ímóti yvirgangi**

ALTJÓÐA YVIRGANGUR

*Árni Joensen*

Eygleiðarar siga, at franski uttanríkisráðharrin, Hubert Vedrine, segði ikki annað enn tað, sum Evropa hugsar, tá hann í einari opinskáraðari samrøðu við franska útvarpið France Inter mikudagin fanst at politikkinum hjá stjórnini í Washington.

- Vit stuðla USA, amerikanska fólkið er vinfólk okkara, og soleiðis verður tað eisini. Men í dag eru vit hótt av einari amerikanskari uppfatan, sum ber í sær, at alt snýr seg um bardagan ímóti yvirgangi. Men vit góðtaka ikki hendan hugburðin. Vit eiga at loysa teir grundleggjandi trupulleikarnar so sum fátækradømi og órættvísi, segði Hubert Vedrine við France Inter.

Politiskir eygleiðarar siga, at orðini hjá franska uttanríkisráðharranum eru enn ein tekin um ta vaksandi ósemjuna millum USA og tess sameindu í Evropa. Aftan á atsóknirnar tann 11. september í fjør góvu evropeisku londini USA fullan stuðul, men síðani er kuril komin á tráðin.

Meðan Bush forseti tosar um lond sum Norðurkorea, Irak og Iran sum "ónd lond" og hóttir við at víðka bardagan ímóti yvirgangi, halda tey sameindu hjá USA í Evropa ikki, at tað er neyðugt við fleiri hernaðartiltøkum.

Treytaleysi amerikanski stuðulin til ísraelsku stjórnina bøtir heldur ikki um viðurskiftini millum USA og Evropa. Í útvarpssamrøðuni segði Hubert Vedrine beinleiðis, at Evropa er ímóti amerikanska stuðlinum til ísraelsku stjórnina.

- Eftir okkara tykki er tað skeivt at stuðla einum politikki, sum ikki hevur annað endamál enn kúgan. Politikkurin hjá Sharon er skeivur. Hetta hava vit sagt, og vit hava lagt fleiri uppskot fram, segði franski uttanríkisráðharrin.

# Kvinnurnar í Kabul farnar aftur í skúla

**Fyri fyrstu ferð í mong ár hava ungar kvinnur tikið prógv á lærda háskúlanum í Kabul**

AFGHANISTAN

*Árni Joensen*

Undir Taliban-stýrinum fingu afghansku kvinnurnar ikki loyvi at útbúgva seg, og tær, sum brutu bannið, vórðu harðliga revsaðar.

Men nógvar kvinnur sýttu kortini fyri at laga seg eftir teimum reglunum. Summar valdu at útbúgva seg við hús, annaðhvørt einsamallar ella saman við øðrum, og nógvar fingu so mikið burturúr, at tær stóðu upptøkuroyndina á lærda háskúlanum.

- Í fleiri ár slapp eg ikki í skúla. Eg noyddist sjálv at útbúgva meg, segði ein av kvinnunum, sum fyri nøkrum døgum síðani stóð upptøkuroyndina á lærda háskúlanum í Kabul.

Áhugin at sleppa á lærda háskúlan var so stórur, at vápnaðir løgreglumenn máttu halda skil á teimum nógvu monnunum og kvinnunum, sum vildu sleppa inn um dyrnar.

Rektarin á lærda háskúlanum í Kabul, Gholan Manten Daniz, hevur ikki sæð kvinnur í skúlastovuni í fleiri ár, og hann segði seg eisini fegnast um, at hin helvtin av samfelagnum var komin aftur í skúla.

Úr Norðurlondum:

## Nýta ikki MMR

Næstan 20 prosent av foreldrunum í Norðurnoregi taka ikki av tilboðnum um at koppseta tey smáu við MMR-vaksinuni.

Heilsumyndugleikarnir í Tromsø siga, at 17 prosent av foreldrunum siga beinleiðs nei, tá læknarnir koma við tilboðnum, og hini trý prosentini aftra seg við at taka av og biðja um umhugsunartíð.

Orsøkin til ivan hjá foreldrunum eru kanningar í Bretlandi, sum benda á, at samband kann vera millum MMR-koppseting og autismu.

## Krevja broyting

Nógvir svenskir politikarar tosa nú um at banna innflytaraforeldrum at noyða døturnar at góðtaka hjúnasamband, longu tá tær eru blaðungar. Orðaskiftið hevur tikið seg upp, eftir at ein kurdiskur maður myrdi sína egnu dóttur, tí hon sýtti fyri at giftast einum kurdiskum manni, sum foreldrini høvdu valt henni.

Mikudagin samtykti Ríkisdagurin at áleggja stjórnini at leggja fram uppskot til lóg, sum skal forða sonevndum "tvningilshjúnaløgum" og hjúnaløgum, har annað ella bæði framvegis eru børn. Og sambært samtyktini skal lógin umfata øll fólk í Svøríki, sama um tey eru svenskir ríkisborgarar ella ikki.

Svensk lóg ásetir, at fólk skulu hava fylt 18 ár fyri at fáa loyvi at gifta seg. Lógin hevur tó eina grein, sum gevur frávik frá hesum aldursmarkinum, men tann reglan umfatar einans svenskar ríkisborgarar. Tað er hent, at fólk av útlendskum uppruna hava fingið loyvi at gifta seg, hóast tey bert hava verið 15 ár. Tá hevur verið víst til lógina í upprunaliga heimlandinum, men hetta verður nú steðgað.